# ítróttur

Nr. 104 • hósdagur • 5. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


Kendi danski málverjin Lars Høgh:

## Fer at stuðla Jens og Jákupi undan torføru dystunum

**–"Island bliver en kæmpe hård nød at knække" sigur danski málverjin Lars Høgh, sum skal venja føroysku málmenninar undan dystunum. Hann heldur tað vera sera týdningarmikið hjá føroyska liðnum at fokusera nógv uppá dystin móti Íslandi. Tað er nevniliga altavgerandi fyri at fáa eitt gott úrslit í tí næsta dystinum móti Týskalandi**



*Lars Høgh er sjálvur kendur málverji og skal hann nú fylgja føroysku landsliðsmálonnunum undan og í dystunum móti Íslandi og Týskalandi*

LANDSDYSTIR
*Jákup Mørk*

Nógv verður gjørt fyri at fáa Føroyum góð úrslit í komandi EM undandystum í fótbólti móti Íslandi og Týskalandi, eitt nú stuðul til málmenninar, sum fáa eina sera torføra uppgávu í báðum dystunum. Í gjár fór fyrrv. Danski landsliðsmálverjinsaman við landsliðvenjaranum, Henrik Larsen beinleiðis til Reykjavíkar við flogfari úr Danmark. Lars Høgh hevur fingið eina bundna uppgávu undan dystunum, og tað er at venja og stuðla føroysku málverjunum.

Vit hittu Lars Høgh, áðrenn hann fór út á hesa heldur sjáldsomu ferð. –Eg eri sera fegin um at hava fingið hesa uppgávuna og skal so gera tað eg kann fyri at stuðla málmonnunum. Hetta er ein sera spennandi uppgávu, sum eg gleði meg til at fara í gongd við.

Lars Høgh hevur egna fyritøku, sum nettupp hevur til endamál at stuðla og venja málmenn. Í løtuni hevur hann nógvar uppgávur, eitt nú arbeiðir hann við Tummas Sørensen hjá Sunderland, við Jimmi Nielsen hjá AAB, tí danska ungdómslandsliðnum, fyri ungdómsskúlar osfr. Talan er um sera fjølbroyttar uppgávur og er tann føroyska eisini serstøk á tann hátt, at hon snýr seg um tveir dystir.

Men ber tað yvirhøvur ber til eftir so stuttari tíð at læra og venja tveir málmenn, sum hava spælt so leingi og tí hava sín málmansstíl?

- Málmenninir á landsliðnum er royndir og góðir málmenn, og tí hava teir sjálvandi eina góða ballast við, tá teir fara á vøllin. Og tað er ein stórur fyrimunur. Mítt íkast vil so hava nakað við motivatión at gera og at stuðla undir ávíst, sum skjótt og lætt kann betrast.

Nú kenni eg bæði Jákup og Jens væl. Men eg havi so ikki vant við teimum fyrr, og tí veldst sjálvandi alt um, hvat vit tríggir finna fram til. Vit fara at tosa saman og so leggja eina ætlan fyri eina venjing. Lars Høgh skal vera saman við føroysku landsliðsmálmonnunum í 9 dagar og vónar hann, at hann kann vera ein stuðul hjá málmonnunum, sum hann annars heldur eru tveir góðir málmenn.

Lars Høgh vónar sjálvandi, at hann kann geva málmonnunum burtur av nøkrum av teimum royndum hann sjálvur hevur gjørt sær gjøgnum árini. –Vit skulu sjálvandi ikki leggja meira í hetta enn tað er, men tað er greitt, at tess meira tú arbeiðir við málmonnunum, tess størri møguleiki er at broyta okkurt. Í hesum førinum verður tó meira talan um at arbeiða við tí, sum málmenninir longu eru dugnaligir til.

Lars Høgh sigur, at síðani í 80 og 90 unum hevur man havt miðvísa málmansvenjing í eitt nú Danmark, men nú heldur hann tíðina vera komna hartil, at man kann fara inn og geva "coaching", har tað verður arbeitt við øðrum síðum av málmansspælinum so sum málsetningi, veikum og sterkum síðum og tí mentala partinum av málmansspælinum eisini. Hetta hevur nakað at gera við, at tú fer inn og hevur eina persónliga coaching við teir einstøku málmenninar.

- Eg haldi annar, at tað er flott og tað er nýhugsan tað, sum fótbóltssambandið er farið í gongd við, nú teir hava heitt á í hesum førinum meg um at taka mær persónliga av báðum málmonnunum.

- Kann hetta eisini hava positiva ávirkan á alt liðið?

- Tað skal eg ikki kunna siga, men tað er greitt, at tess fleiri av parametrunum hjá einum landsliði verða ment, tess størri møguleiki er fyri at tingini eydnast.

Vit sprurdu Lars Høgh um tað ikki er serliga týdningarmikið at hava góðar málmenn, tá hugsað verður um eitt nú sterku týsku álopsmaskinuna?

- Tað er greitt. Men eg haldi tit hava so góðar málmenn, at teir fara at megna hesa uppgávuna væl. Eg vil sjálvandi geva mítt íkast, men tað er málmaðurin sjálvur, sum tekur avgerðina, tá er á vøllinum. Man kann geva honum nøkur góð amboð og góð "hint" tí man sjálvur hevur staðið so nógv í máli.

- Hvussu nógv er talent og hvussu nógv hevur venjing at siga fyri at vera ein góður málmaður?

- Talentið skal vera har. Og so skal tað vera ein vilji til at vilja arbeiða "sten hamrende hårdt og målrettet". Og har eru tit sera væl fyri við tykkara málmonnum.

Lars Høgh sigur, at tað ræður um at gera tey einføldu tingini rætt. Tað er essensurin við málmansspælinum.

Kendi danski málverjin viðgongur annars, at tað verða tveir sera torførir dystir Føroyar skulu spæla. – "Island bliver en kæmpe hård nød at knække" sigur málverjin, sum heldur tað vera sera týdningarmikið hjá føroyska liðnum at fokusera nógv uppá dystin móti Íslandi. Tað er nevniliga altavgerandi fyri at fáa eitt gott úrslit í tí næsta dystinum.



*Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen er tveir frálíkir málmenn sigur danski Lars Høgh, sum nú fer at motivera teir til torføru dystirnar*

### Fakta

Tryggingarfelagið Føroyar vendi sær herfyri til Fótbóltssambandið, við atliti til A-landsdystirnar Ísland - Føroyar 7. juni 2003 og Føroyar - Týskland 11. juni 2003 og beyð sær til at hjálpa Fótbóltssambandinum at fyrireika landsliðið so væl sum gjørligt til nevndu dystir.

Eftir tilráðing frá A-landsliðsvenjaranum Henrik Larsen, varð avgjørt millum FSF og Tryggingarfelagið at heita á Lars Høgh um at hava servenjing við A-landsliðsmálmonnunum v.m.

Lars Høgh verður við hesi avtalu tilknýttur A-landsliðnum frá 4. til 12. juni 2003. Umframt at hava servenjing við A-landsliðsmálmonnunum er ætlanin at skipa fyri frálæru og venjing 9. ella 10. juni 2003 fyri føroyskum málmansvenjarum og málmonnum.



## Kappingin á Silly-oyggjunum verður av ongum

**Róðrarsamband Føroya vónar kortini, at tað fer at eydnast teimum at finna aðra útlendska kapping til føroyska kappróðrarfólkið**

KAPPRÓÐUR
*Páll Holm Johannesen*



*Kvinnumanningin á Jarnbardi kappaðist seinast í apríl mánaði á Silly oyggjunum. Í løtuni røkist lítið fyri, at føroyingar komandi ár verða við í kappingini á Silly oyggjunum.*
*Mynd: Savnsmynd*

Seinastu árini hevur verið fastur táttur hjá føroyskum róðrarfólki at kappast um luttøku á GIG-róðrarkappingini á Silly-oyggjunum. Síðan 2000 hava føroyingar róð kapp á Silly-oyggjunum. Alt bendir nú á, at luttøkan á Silly verður av ongum komandi ár.

Høvuðsstuðulin aftanfyri føroysku luttøkuna, oljufelagið Faroese Partnership, hevur boðað Róðarsambandinum frá, at endamálið við stuðulinum er rokkin, og at tíðin er búgvin at stuðla øðrum pørtum í føroyska samfelagnum. Luttøkan á Silly-oyggjunum er sera kostnaðarmikil, og samstarvið við Faroese Partnership hevur verið hornasteinurin undir luttøkuni hjá føroysku kappróðarmanningunum. Nú samstarvsavtalan er uppsøgd, tykist rættiliga sannlíkt, at føroyingar ikki vera umboðaðir í kappingini á Silly oyggjunum komandi vár.

Formaðurin í Róðrasambandið Føroya, Hannis Joensen, er harmur um avgerðina hjá Faroese Partnership, men skilur kortini væl avgerðina, tí stuðulin er sera kostnaðarmikil hjá felagnum. Hannis Joensen leggur dent á, at partarnir skiljast í sátt og semju, og Róðrarsambandið takkar Faroese Partnership fyri gott samstarv seinastu árini.

Sum skilst á formanninum í Róðrarsambandi Føroya, so verður arbeitt við at finna aðrar kappingar í útlondunum til føroyska kappróðarfólki, tí stórur áhugi er fyri slíkum kappingunum millum kappróðrarfólki, sigur formaðurin Hannis Joensen

### Stórt spell

Seinast í apríl mánað í ár, var kvinnumanningin á Jarnbardi á Silly oyggjunum og kappaðist. Ein av Silly-veteranunum er róðurskvinnan á Jarnbardi í fjør, Jannie Dam Jacobsen. Hon hevur verið við í kappingini á Silly oyggjunum tríggjar ferðir. Hon heldur at tað er stórt spell, at luttøkan í kappingini nú verður av ongum. – Tað er eitt stórt upplivilsi at luttaka, og kappingin er ein eyka gularrót hjá kappróðarfólkinum, og tí er tað stórt spell, at kappingin á Silly ikki fer at hava føroyska umboðan komandi ár, sigur Jannie Dam Jacobsen at enda.

Enskur journalistur:

## Føroyar møguleika at enda á øðrum plássi í bólkinum

LANDSDYSTUR
*Páll Holm Johannesen*

Tað er onki yvir at dylja, at rættiliga stórur áhugi er í Føroyum fyri landsdystunum ímóti Íslandi og Týsklandi. Landsliðið fór av landinum í gjár, har leiðin gekk til Íslands. Við í ferðalagnum eru umboð fyri flestu fjølmiðlarnar í Føroyum, og Sosialurin er sjálvsagt eisini við í ferðalagnum, og fer komandi dagarnar at fylgja við okkara monnum undan dystinum í Reykjavík leygardagin.

Eftir øllum at døma eru tað ikki bert føroyskir fjølmiðlar, sum sýna føroyska landsliðnum áhuga. Á einari av mest vitjaðu heimasíðum hjá fótbóltsfjepparum, soccernet.com, er í løtuni ein sera áhugaverd og rúgvumikil grein um føroyska fótbóltslandsliðið.

Tað er enski journalisturin, Chris Connelly, sum hevur skrivað greinina. Hann vísir á, at komandi vika verður størsta fótbóltsvikan hjá føroyingum nakrantíð. Onglendingurin er so mikið bjartskygdur undan stóru uppgávunum ímóti Íslandi og Týsklandi hjá føroyska landsliðnum, at hann metir tað ikki vera heilt óhugsandi, at føroyingar fara at fáa úrtøku úr báðum dystunum.



*Tað eru ikki bert føroyskir fjølmiðlar sum sýna føroyska landsliðnum áhuga. Í eini av mest vitjaðu heimasíðunum hjá fótbóltsfjepparum, soccernet.com, er í løtuni ein áhugaverd grein um føroyska fótbóltslandsliðið. Greinaskrivarin biður m.a. týskararnar ikki taka sær av verkfallinum í Føroyum í løtuni, men áttu heldur at ansa eftir vandamikla læraranum John Petersen.*
*Mynd: Savnsmynd*

Hann væntar eisini, at føroyingar væl kunnu gera seg galdandi í kappingini um annað plássið í bólkinum. Hann metir Týskland vera sterkasta liðið í bólkinum, men eftir hansara tykki kunnu øll hini liðini enda á øðrum plássi. Liðini, ið enda á øðrum plássi fáa atgongd til ein sokallaðan play-off dyst um eitt pláss í EM kappingini í Portugal næsta summar.

Chris Connelly fylgir eftir øllum at døma væl við í føroyskum samfelagsviðurskiftum í løtuni, ti hann nevnir í grein síni um landsliðið, at stórt verkfall herjar oyggjarnar í løtuni.

Onglendingurin vísir á, at týskararnir skulu ikki taka sær av verkfallinum, og áttu heldur at hugsa um føturnar hjá vandamikla læraranum, John Petersen, sum vanliga hevur lætt at finna fram til málmeskarnar. Største hóttanin hjá týskararunum átti tí heldur at verið John Petersen, og ikki drúgva verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum, skrivar Chris Connelly millum annað í grein síni.

## Fimm fótbóltsskúlar í summar

TÍÐINDASKRIV

Aftur í ár skipar fótbóltssamband Føroya fyri fótbóltsskúlum, og verða teir fimm í tali hesaferð.

Skúlarnir eru fyri børn í aldrinum 8 til 14 ár.

Fótbóltsskúlarnir verða á hesum støðum:

**26.-27.06.2003** í Sandavági. Høvuðsvenjarar verða Atli Gregersen og Páll F. Joensen

**27.-28-06.2003** í Klaksvík. Høvuðsvenjarar verða Bill M. Jacobsen og Annfinn Danielsen

**27.-28.06.2003** á Toftum. Høvuðsvenjari verður Jógvan Martin Olsen

**27.-28.06.2003** í Tórshavn. Høvuðsvenjari verður Petur Simonsen

**04.-05.07.2003** í Vági. Høvuðsvenjari verður Mathias Davidsen

Fyrra dagin vara skúlarnir frá kl. 13.00 til 18.00 og seinna dagin frá kl.10.00 og til umleið kl.16.00.

Tilmeldingarbløð verða løgd út til feløgini og á posthúsini og fólkaskúlarnar kring landið **04.06.2003**, og er tilmeldingarfreistin 18. juni 2003.

Tá skúlarnir enda, fáa børnini ein T-shirt og eina sodavatn, ið Føroya Bjór hevur latið, og góðgæti, ið P/F Kjølbro heilsølan hevur latið. Somuleiðis fáa tey prógv og ein fótbólt.

## Báðir landsdystirnir sendir beinleiðis

Sjónvarp Føroya hevur fingið loyvið at senda landsdystirnar ímóti Íslandi og Týsklandi beinleiðis. Vanliga hevur SVF trupulleikar at fáa loyvið at senda heimadystirnar beinleiðis, men av tí dysturin ímóti Týsklandi longu er útseldur, verður hann eisini sendur beinleiðis.

Sambært Varpinum, sum verður í Sosialinum í morgin, byrjar SVF at senda Ísland-Føroyar kl.16.00 leygardagin, og Føroyar-Týskland kl.19.45 mikukvøldið.

**-páll**